**§ 37: Øki L: Øki til frítíðarhús, húsvognar og tjalding**

1. Á økinum er loyvt at byggja frítíðarhús, og at skipa øki til húsvognar og tjalding. Bygningar til felags umsiting og tænastuveitingar kunnu byggjast á økinum.
2. Grundstykkini til frítíðarhús skulu vera í minsta lagi 150 m2 til støddar.
3. Loyvt er at gera fleiri frítíðarhús til útleigan á sama matrikli. Tó skal víddin samanlagt svara til minst 150 m2 til hvønn bygning, tá ið lendið lagt av til felags tilhalds- og parkeringøki er drigið frá.
4. Nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,5 fyri frítíðarhús.
5. Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 4 m til yvirgrind og 6 m til mønuna mátað frá miðaljørðildi. Er munurin á lægsta og hægsta jørðildi meira enn 2 metrar, kann kjallari gerast. Kjallari má tó bert verða til víddar 50% av víddini á stovuhæddini. Har bygging er framvið vegi, kann byggimyndugleikin áseta hæddina á kjallaraloftinum í mun til veghæddina. Har kjallari ikki verður gjørdur, skal støðið undir húsunum í mesta lagi vera 60 cm.
6. Í serstakari byggisamtykt er ikki loyvt at fara upp um tey nýtslustig, sum nevnd eru í 4. stk., tá økið verður roknað sum heild.
7. Býráðið kann krevja, at girðing verður gjørd um økið til hvørt frítíðarhús.
8. Frítíðarhúsini skulu sum minstamát hava lagt el, hita og vatn til húsini og kloakk frá húsunum. Harumframt skulu inni á økinum verða neyðug gøtuljós uppsett. Allar íløgur hesum viðvíkjandi skulu rindast av byggiharranum, umframt at byggiharrin skal rinda gjald fyri íbinding av vatnveiting og kloakk.
9. Skipan og bygging kann bert fara fram sambært góðkendari serstakari byggisamtykt.

01-04-2026 LJ